


*Tað sá eitt sindur ófrættakent út fríggjamorgunin, tá Stelkur og Bakur hjá Faroe Seafood, ið vanliga plaga at loysa sama kvøld, sum skipini landa, lógu bundnir við bryggju – inni í havnini í Runavík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Sera dapur fríggjadagur

**FAROE SEAFOOD Fríggjadagurin gjørdist lagnudagurin hjá Faroe Seafood og hjá flestu av teimum mongu, sum høvdu sítt starv hjá samtakinum. Sum seinnaparturin leið, var líkt til, at ring boð vóru í væntu. Tað skuldi eisini vísa seg, at ófrættakenda støðan, sum sást og merktist hendan dagin, gjørdist veruleiki, og almenningurin varð at enda kunnaður um, at Faroe Seafood var sent Skiftirættinum**

**Vilmund Jacobsen**

Fríggjamorgunin sóust skip hjá Faroe Seafood, sum vanliga plaga at loysa sama kvøld, sum tey landa, framvegis liggja bundin við bryggju dagin eftir. Soleiðis lógu ísfiskatrolararnir, Stelkur og Bakur, lið undir lið inni í havnini í Runavík, sum ikki sá serliga dámligt út. Vanliga plaga skipini eisini at liggja við Betabrúnna eftir loknan túr, men soleiðis var ikki hendan dagin.

Tá tú fregnaðist, hví so var, fekst tú at vita, at nógv fundarvirksemi um Faroe Seafood var hendan dagin, og fólk væntaðu, at eitt hvørt fór at henda.

Út á seinnapartin bórust eisini tíðindini um, at samráðingarnar millum tey trý feløgini, sum høvdu ætlað sær at yvirtaka felagið, vóru slitnaðar.

Í samrøðu við Norðlýsið váttaði Anfinn Olsen, reiðari hjá Framherja, sum var ein av ætlaðu keyparunum, at teir einki høvdu frætt aftur frá Eik Banka, og tí segði hann seg vænta, at "heilt aðrir partar sita við borðið í løtuni".

Sama seinnapart váttaði eisini Ingi Højgaard, nevndarformaður í Faroe Seafood, yvirfyri Kringvarpinum, at teir nú vóru farnir eftir plani B, sum hann tók til.

- Støðan er álvarsom, tí eingin trygd er fyri, at tey 800 starvsfólkini hjá Faroe Seafood sleppa til arbeiðis aftur mánamorgunin, legði nevndarformaðurin aftrat.

### Í Skiftirættin

Seint seinnapartin fríggjadagin gjørdist so endaliga greitt, at avgerð varð tikin um at senda Faroe Seafood í Skiftirættin.

Bústjórar, Ingi Højgaard og Eyðfinnur Jacobsen, advokatar, vórðu settir.

Avgerðin merkir, at øll virkini, sum felagið hevur rikið, verða stongd, til nýggir møguligir eigarar – ella leigarar - fáa høvi at lata tey uppaftur.

Nøkur av skipunum, sum samtakið eigur lut í, verða væntandi siglandi fyribils, meðan onnur helst noyðast at binda.

Millum 500 og 700 fólk vóru knýtt at flakavirkjunum hjá Faroe Seafood. 100-120 mans vóru knýttir at skipunum, umleið 25 fólk at landingarmiðstøðini Kongshavn – og eini 12 fólk vóru knýtt at virksemi hjá samtakinum uttanlands.

Feløg, sum áttu meiri enn 5% í Faroe Seafood samtakinum, vóru: P/F Notio Framtaksfelag (48,5%), Vátryggingarfélag Íslands hf (19%), Framtak (17,5%) og Sp/f 29.03.2006 (7,5%).

*vilmund@sosialurin.fo*

# Húsagangur

**FAROE SEAFOOD - Enn eru ikki øll viðurskifti greið, og soleiðis er heldur ikki endaliga greitt, hvussu verður við eitt nú Kongshavn, men líkt er til, at landingarmiðstøðin kemur at halda fram, sigur annar bústjórin, Eyðfinnur Jacobsen**

**Vilmund Jacobsen**

Tað var fríggjadagin, 3. desember, klokkan 17.10, at Føroya Skiftirættur tók avgerð um, at P/F Faroe Seafood fór í fíggjartrot, sum tað verður rópt.

Samstundis gjørdi Skiftirætturin av, at Ingi Højgaard, sum annars var nevndarformaður í Faroe Seafood og Eyðfinnur Jacobsen, advokatar, vórðu settir fyribils bústjórar.

Tey, sum arbeiddu á ymisku postunum hjá Faroe Seafood – á virkjunum, sigldu við skipunum, á landingarmiðstøðini Kongshavn ella aðrastaðni í felagnum – fingu einki at vita, fyrr enn tey frættu um ólukkuligu støðuna í fjølmiðlunum.

Í eini fráboðan, siga bústjórarnir seg harmast um, at teir ikki fingu møguleikan sjálvir og beinleiðis at kunna starvsfólkini um hesa avgerð.

Í morgun vóru fleiri lýsingar í útvarpinum hjá Kringvarpinum, har arbeiðarafeløg kallaðu arbeiðsfólk til fundar í dag saman við Arbeiðsloysisskipanini og við umboðum fyri búgvið eftir feløgini, sum eru farin á húsagang.

Á hesum fundum verður kunnað um viðurskiftini, og kunnað verður eisini um, hvørji rættindi og skyldur arbeiðsfólk hava undir verandi umstøðum.

Skiftifundur verður aftur fríggjadagin 17. desember klokkan 10 á Vestaru Bryggju í Havn, har fyribils bústjórarnir fara at leggja fram yvirlit yvir ogn og skuld hjá búnum.

Tað verður á hesum fundi, at varandi bústjórn skal veljast.



*Eyðfinnur Jacobsen er annar av fyribils bústjórunum, nú P/F Faroe Seafood er farið á húsagang. Hin er Ingi Højgaard. Hin 17. desember verður varandi bústjórn vald*

### Enn er ógreiða

Eyðfunnur Jacobsen, sum er annar av fyribils bústjórunum, sigur í morgun, at enn eru ikki øll viðurskifti púra greið.

Hann sigur, at móðurfelagið P/F Faroe Seafood er farið á húsagang og við hesum virkini, sum felgið átti. Haraftrat er P/F Faroe Fish 2 farið, sum eigur partrolararnar, Bak, Stelk, Rók, Lerk og Heyk og Falk.

Bústjórin sigur, at P/F Faroe Fish 1 er ikki farið á húsagang, og soleiðis heldur ikki feløgini, sum eiga og reka partrolararnar, Jaspis og Ametyst og djúpvatnstrolaran, Ednu.

Samtakið Faroe Seafood eigur 100% í partrolarunum Heyki, Falki, Róki, Lerki, Stelki og Baki – og 66% í partrolarunum Jaspis og Ametyst. Haraftrat eigur samtakið 50% í djúpvatnstrolaranum, Ednu.

### Landingarmiðstøðin

Eyðfinnur Jacobsen sigur, at felagið, sum eigur landingarmiðstøðina Kongshavn í Saltangará, er heldur ikki farið á húsagang.

- Enn eru ikki øll viðurskifti greið, og soleiðis er heldur ikki endaliga greitt, hvussu verður við eitt nú Kongshavn, men líkt er til, at landingarmiðstøðin kemur at halda fram, sigur bústjórin, Eyðfinnur Jacobsen.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Maður, kona, dó




***- Vit fingu ikki klæðini við okkum, sigur Harry Johannesen***

*Mynd: Vilmund Jacobsen*